TING-HELLAN

# Føroyskt Fólkating?

TINGHELLUANALYSA
*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*



Fólkatingsval er. Í mun til okkara løgtingsval, so umfatar fólkatingsvalið øll trý londini í Ríkisfelagsskapinum. Føroyar eru eitt valdømi til fólkatingsvalið og verða tvey av teimum tilsamans 179 umboðum vald í Føroyum.

Í mun til løgtingsvalið, har vit velja okkara umboð at sita í Tinghúsinum mitt í høvuðstaðnum mitt í okkara egna landið, senda vit fólk av landinum at luttaka í fólkatingsarbeiðnum. Hetta er parturin av at vit eru í einum ríkisfelagsskapi, og soleiðis fáa vit ávirkan á ikki yvirtikin málsøkir í Ríkisfelagsskapinum. Men hóast vit hava okkara egnu skipan, heimastýrisskipanina, sum vit sjálvi varða av, og har yvirtikin málsøkir eru okkara, í hvussu so er innlendisparturin, so eru limirnir sum vit velja í Fólkatingið, fullgyldugir limir og ikki á nakran hátt avmarkaðir. Henda atgongdin til danska parlamentið, er somuleiðis danska grundgevingin fyri, at Føroyar og Grønland eru ein samrunnin partur av danska ríkinum.

## Flokkssamstarv

At vit velja limir í danska fólkatingið, merkir ikki at føroysku evnini eru ein samanrunnin partur av donsku flokksskipanini. Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin hava tó søguliga arbeitt saman við flokkum á Fólkatingið. Javnaðarflokkurin hevur søguliga havt eitt tætt samstarv við danska Socialdemokratiet, men Jóannes Eidesgaard valdi at standa uttanfyri frá 1998-2001.

Sambandsflokkurin samstarvar við Venstre og er vanligt, at um Sambandsumboð verður valt á Fólkating, so fer tað beint í valbólkin hjá Venstre, eins og Lisbeth L. Petersen hevur gjørt hesa seinastu valsetuna. Fólkaflokkurin hevur samstarv við Konservative, og hevur eisini tikið lut í teirra bólki. Tað forvitnisliga við hesum samstarvum er, at í stevnuskráðum minna Fólkaflokkurin og Venstre almikið um hvønn annan, eins og Konservative og Sambandsflokkurin gera tað. Tí kann sigast, at samstarvið er meira ein søgulig tilvild, at Venstre og Sambandsflokkurin hava samstarvað síðan byrjanina av hini øldini, meðan Fólkaflokkurin ikki bleiv stovnaður fyrrenn nakað seinni.

## Ikki sama floksskipan

Men hóast samstarv hevur verið, merkir tað ikki at flokkarnir eru teir somu. Flokksmyndin í Føroyum og í Danmark er als ikki tann sama og hevur heldur ikki verið tað, helst í tjóðskaparspurninginum sum størstu orsøk.

Tjóðveldisflokkurin hevur ofta verið ivasamur, um flokkurin skal stilla upp til Fólkatingsval, tí endamál floksins er at sleppa undan Fólkatinginum. Men nú hevur flokkurin valt at brúka hesa umboðan fyri at røkka máli sínum.

## Broyting

Eftir míni meting er tí vert at leggja til merkis, at fólkatingsvalið í Føroyum hevur broytt seg seinastu árini. Fyri bert fáum árum síðan var ongin ivi um at umboðini fóru beint inn í donsku flokkarnar at samstarva fyri at fáa ávirkan. Ikki er bert tað eina dømi, at føroyskur fólkatingsmaður hevur verið tungan á vágskálini, tá rein donsk mál skuldu avgreiðast. Av teimum meira stuttligu og sjónligu kann nevnast, at Óli Breckmann tryggjaði politiska meirilutan handan stovnsetanini av TV2. Hinvegin kann sigast at hann við hesum avtók ein einkarætt, sum hóskar væl til hansara politisku áskoðan.

Ymiskt er, hvussu umboðini vald í Føroyum hava valt at arbeiða. Tað er frá at vera heilt vanligur limur í einum tingbólki og møguliga tann vegin sleppa framat nevndarsessum og avgerðum, til at standa uttan fyri, sum m.a. Jóannes Eidesgaard gjørdi, og so tað at stovna ein serstakan bólk, sum stovnanin av Norðuratlantsbólkinum var, eitt samstarv millum tveir grønlendskar og ein føroyskan flokk. Javnaðarflokkurin hevur sagt, at samstarv sum Norðuratlantsbólkurin er eitt gott hugskot.



*Ymiskt er, hvussu umboðini vald í Føroyum hava valt at arbeiða, tá tey eru komin á Christiansborg*

## Danska valstríðið ikki ans

Men lítið er at ivast í, at danska politiska spælið ikki er nakað sum føroyingurin fylgir við í, og er tað heldur ikki tað, valstríðið í Føroyum snýr seg um. Hyggja vit eftir valevnunum, sum eru frammi í dag, sæst at eingin samanhangur er millum valstríðini í Danmark og Føroyum. Evnini sum fram verða tikin, hava einki samband við hvørt annað. Í Danmark verða Føroyar og Grønland slett ikki nevnd. Men hetta